Paria?

Harri lærari Hákun Djurhuus!

Tygum meinti also einki ilt við orðið »fyrstalæraraevni«. Ja, ja tað er jú menniskjansligt at taka feil og at gera feil, og eisini hava menn fortalað seg, og av og á hava menn eisini skrivað eitthvat, sum betri var óskrivað, — orð kunnu t. d. loypa frá penninum, næstan uttan at maðurin ansar eftir tí.

Eg síggi nú av tí svari, tygum hava givið mær í heiðraða blaði tygara, at tygum ikki hava ætlað at vanvirða hr. P. M. Dam við orðinum »fyrstalæraraevni«. Orðið man helst vera gloppið tygum út av hondini soleiðis í tankaloysi, og so skal tað ikki meira frá míni síðu verða kastað tygum fyri; men tygum fata sjálvanda, at menn við føroyskum læraraprógvi minnast á orðataki: »Hoyr um ein annan, og hygg um teg sjálvan.« Var tað brotsgerð, ið P. M. Dam gjordi, tá ið hann søkti fyrstalæraraplássið á Tvøroyri, so er tað altíð ein brotsgerð fyri ein mann við berum føroyskum læraraprógvi at søkja eitt fyrstalæraraplass. Tað vil við ørum orðum siga, at her á landi er ein lærara-pariuklassi, sum skal halda sínar fingrar stillar tá ið slík pláss standa lýst opin. Men er tað soleiðis vorðið? Ja, eg veit tað ikki; men hann ið fylgt hevur við bløðunum hesa seinri tíðina, síðan læraraplássið á Tvøroyri kom til viðgerðar í kapitalistpressuni, hann má næstan fáa ta fatan.

Tað gleðir meg, at tygum geva eina soljóðandi frágreiðing nú: »Eg haldi tað ikki vera til nakran minnkan fyri ein mann o. s. fr.«

Um at skifta hagsjón leggi eg einki í at tjakast. Eg veit fullvæl, at menn eru farnir frá einum politiskum flokki og til ein annan. Tað er ikki sjáldsamt; men hví leggjast á sínar fornu vinir? Latum okkum halda okkum til politikkin og halda tað uttan fyri, sum einki hevur við politikk at gera. Dam hevði loyvi at søkja plássið, tað gjordi hann — søknarstýrið og skúlakommissiónin høvdu rætt at stilla hann inn — og tað varð gjort — direktiónin hevði rætt at útnevna Dam; men kundi eisini útnevna ein annan, og tað seinna gjordi teir høgu harrar, sum sita í direktiónini. Latum okkum nú vóna, at direktiónin hevur gjort rætt, og at alt gongst væl. Tað ynski eg, og síðan hugsi eg um onnur viðurskifti, sum eg má og skal hugsa um. Punktum.

Eg havi als ikki talað ella skrivað um nakað feitilendi hvørki í Porkeri ella í Klakksvík. Her er einki tílíkt lendi, og hvussu ið vorðið er í Klakksvík kann fyri so vítt liggja uttan fyri meg; men tygum mega væl vita, at ein væl kann hugsa kapitalistiskt, um hann er fátækur. Hitt umvenda er eisini ofta hent — tíbetur. Øll tey, sum verja tað kapitalistiska — ella rættari: tað privatkapitalistiska stýrislagið, roknast til kapitalistbólkin.

Tað harmar meg mikið, at ikki øll hava fingið eyguni upp fyri, tí vælsignilsi, ið jørðin kundi verið — ella verðið — í fall frælsi, javnaður og bróðurskapur ráddu her á fold. Eisini her í okkara lítla fátæka landi kundi mangt verið aðraleiðis, bert vit øll drógu eina línu — og gingu javnaðarleið. Ja, tað harmar meg, at ikki øll hava fingið eyguni upp fyri hesum; men tíggju ferðir, ja, mangar ferðir tíggju ferðir — meira harmar tað meg, tá ið menn, sum einaferð høvdu fingið annað eygað upp, eru fallnir hin vegin aftur. Tað er mær fortalt, at tygum eru ein av teim. Tað gerst kanska ikki um aftur, men hugsið tygum um einaferð aftrat — og hugsið gjølla; brótið ikki tað niður, sum kanska kundi verið til vælsignilsi fyri tey fátækramannsbørn, sum tygum hava við at gera.

Frælsi, javnaður og bróðurskapur er eitt merki, sum eigur at veitra yvir unglingafjøld okkara, ífall nakað lív skal verða her á hesum fátæku oyggjum. Samband, sjálvstýri, loysing og uppgerð, ella hvat nú alt er, sum hoyrist um oyruni og lesist í bløðunum, eigir alt at setast í aðru — ella tríðju rekkju — annað ella tríðja rað.

Men nú skrivaði eg nógv meira, enn eg av fyrstantíð hevði ætlað, og endi tí við vón um, at eg finni bjálkarnar, og tygum finna flísirnar. Tí sanniliga hevur ein og hvør meiri enn nokk við seg sjálvan.

J. H. Danbjørg.

Viðmerkingar.

Ein ringur roykur

av versta slag av persónligum skemdar- og ókvæmisorðum og villari illgitan móti einum og øðrum — og ein sera stuttligur naivitetur — er tað einasta, ið eftiri er av P. F. Joensens politisku atsókn.

Tílíkt nervar bara mannin sjálvan og blaðið, ið hýsir tí, og liggur ikki fyri okkum at fáast við.

Vit øvunda ikki ‚Føroyatíðindi' fyri at eiga einarættin til og æruna av einum tílíkum »einastandandi journalistikki«.

*

Túnatos.

Páll: Nú er Kristin í Geil farin at skriva í »Dagblaðið«.

Pætur: — Tú meinar væl Jóannes bóndi?

Páll: Hann! ja, tað er langt síðani, hann gjordist ein av teim stórstu »Dagblaðs«-kanónunum. Logið kortini, at hann ikki sjálvur varnast, at eingin leggur so mikið lag í hansara fyndarleysu øsnan og mosnan, at teir hirða at svara honum. — Nei, eg meinti tað, eg segði: Kristin í Geil hevði hósdagin eina frálíka yrking í »Dagblaðnum«.

Pætur: Ha—a — Kristin!? — Jú, men er hann ikki deyður fyri fleiri árum síðani?

Páll: Deyður, sigur tú? — Jú, víst so. Trýrt tú hann hevði skrivað í »Dagblaðið«, meðan hann var á lívi?

Postmann!

Porkerningurin Jákup og Hovbingurin Hanus hittust miðvikudagin og talaðu saman um, hvat ið hent var í Eysturriki, Spanien og aðrastaðni.

Jákup: Nú kemur mjólkarbáturin.

Hanus: Høvdu vit nú fingið post frá »Smirli«, so hevði tað verið hugnaligt. Ikki er meira nýtt enn so. Eg meini, at eg fari tann vegin út at vita, hvussu vorðiðið er.

Jákup: Tað man lítið bata. Hasin báturin siglur við mjólk og gomlum postpakkum — og ja — av og á eitt hálvræst »Føroyatíðindi«. Ja, soleiðis av og á — tá ið tilber — vælsignað. Smirlapostinum fara vit sjálvir til Vágs eftir, ella má hann liggja til fríggjadagin.

Hanus: Gaman í hjá tykkum. Tit búgva so nær við Vág. Men hvat siga tit um okkum. Vit síggja »Smiril« fyri Hovsfjørði hvønn miðvikudag á miðdegi — stundum fyrr — og mjólkarbáturin siglur sama dag. »Smiril« og mjólkarbáturin fara í senn norður fyri fjørðinum, og stundum fer »Smiril« norður fyri fjørðinum, áðrenn postbáturin kemur undan Porkerisnesi. Hin fyrri fer sína leið til tær stórru bygdirnar, sum fáa postin ferskan. Men mjólkarbáturin kemur inn higar at arga okkum við gomlum ballingum. Hin posturin skal liggja í Vági, til øll líkteknini síggjast á honum. Tá kemur hann gamalur til Hovs.

Jákup: Hatta er lagið, vælsigna. Men nú kemur postmann!

Hanus: Hvør er tað?

Jákup: Tað veit eg ikki; men dreingirnir rópa, at nú kemur postmann. So fáa vit nokk postin. Tí nú eru 3 tímar síðan, »Smiril« fór her fyri fjørðinum til Vágs. Hygg — hann fer longu norður aftur. Men hví liggur mjólkarbáturin her og melur, og maður kemur við postinum.

Tá kemur Símun og sigur teim, at hundurin á mjólkarbátinum kemur úr Vági, og tað er honum, báturin bíðar eftir.

Hanus: Men Jákup segði, at postmann kemur við Smirlaposti.

Jákup: Ja, tað hugsaði eg; men hundurin eitur Postmann.

Hanus: Dugir hundurin at bera post?

Jákup: Tað veit eg ikki. Men hann er ikki so dýrur fyri landið sum mjólkarbáturin, og hann ger næstan somu nyttu.

Hanus: Ja, nú fati eg alt. Hundurin er postmaður. Men hví siglur hann so ikki við bátinum?

Jákup: Hevði hann rátt umborð, so fingu vit kanska postin.

Hanus: Ja, ja, vælsigna. Hevði hann rátt fyri øllum posthúsum í Føroyum, so vistu vit av, at vit hovdu eitt hundaskil. So høvdu vit einki at væntа — og so stóðu vit ikki so snópnir og bíðaðu eftir posti.

— — —

Tað hava tit umtrent rætt í, svaraði Postmann. — Og tað haldi eg eisini.

Undrandi.

Tíðindi.

Gudstjeneste.

I Aften Kl. 8 Fastegudstjeneste ved Pastor Møller.

5. Søndag i Fasten prædiker Provst Dahl i Thorshavn Kirke.

Samme Søndag prædiker Pastor Møller i Hestø Kirke.

K. F. U. M.

Søndag Aften »hjemligt Samvær.«

Cand mag. Haraldsen taler: »Indtryk fra Slagmarken i Nordfrankrig.« Der sluttes med Andagt.

Frelsens Hær.

Søndag Kl. 11 Helliggørelsesmøde. Kl. 5 Vaglet. Kl. 8,15 Frelsesmøde. Børnemøder Kl. 2 og Kl. 6.

Tirsdag og Fredag Vaglet (eller Lokalet.)

„Hastings",

enskt kríggsskip, hevur vitjað Tvøroyri. Tað kom har ónsdagin og lá til fríggjadagin.

Í gjár kom tað á Havnina, har tað verður liggjandi einar 4—5 dagar.

„Isabella",

slupp hjá T. F. Thomsen, a/s, var úti fyri tí óhappi at vera við at fara á land norðuri við Mjóanes. Teir máttu ankra hana upp og fara í bátunum inn til Gøtu. Tess betur hildu akkerini, so hon seinni kundi sleipast til Havnar.

Hon hevði brotið aksilin.

Fimleikarframsýning.

Í morgin kl. 3 verður fimleikarframsýning í fimleikarhøllini í Havn.

Sum vant verður aftur í ár bæði eitt lið av kvinnum og eitt av monnum at luttaka.

Jarðareformurin.

Íggjár, 1. apríl, kom jarðareformurin í gildi. Henda lóg er eitt munandi framstig fyri føroyskan landbúnað og verður óivað at hava nógv at týða og er eitt munandi tak fyri at hjálpa vinnulívi okkara aftur á fótur.

Havnar arbeiðsmannafelag

hevur sagt upp lønsáttmálan, tað hevur havt við arbeiðsgevararnar, til 1. mai.

„Tonno",

ein av italiatrolarunum, hevur roynt undir Føroyum, men av teirri orsøk, at trolspælið var ov veikt, varð royndin miseydnað. Hann fór í gjár til Skotlands fyri at fáa bøtt um tað.

Nýkomið stórt úrval av fyrsta flokks frálíka væl gjørdum

Harraklædningum og Sportsklædningum.

Vit hava alt til konfirmatiónina, nýkomnir bláir konfirmantsklædningar, hvítar skjúrtur, slips o. s. fr. — Stórt úrval av fyrsta flokks skótoyi til harrar, kvinnur og børn.

Havnar Kontanthandil P|F.

SJÓNLEIKARHÚSIÐ

GUSTAV WIED: „KÆRLEIKI"

Skemtileikur í 2 pørtum umsett hevur C. Holm Isaksen. Leygardag 2. apríl kl. 21 og sunnudag 3. apríl kl. 18.

Atgongumerki á kr. 1.50 og 1.00 í H. N. Jacobsens bókahandli og við dyrnar.

SILDEGARN

Et stort Parti nye barkede Sildegarn sælges billigt.

A|S Balslev & Co.

Tlf. 20, 193, 237.

Føroya felag móti tuberklasjúku

heldur aðalfund týsdagin 5. apríl kl. 8 í Havnar Klubba.

Dagsskrá:

1) Roknskapurin verður framlagdur.
2) Formaðurin greiðir frá farna árinum.
3) Val av nevnd og roknskapargranskarum.
4) Ymist.

Nevndin.

Búnaðarfólk

eiga at gerast limir av

Føroya Búnaðarfelag.

Lýsið í „Socialinum"!